

*Hallgerð Arge Hansen hevur einki ímóti, at børn fara í skúla seks ára gomul, men so undirvísingin lagast meira eftir børnunum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Veiku næmingarnir rinda rokningina

**SKÚLI** Heldur enn at skerja fólkaskúlan, eigur nógv meira orka at verða brúkt upp á byrjanarundirvísingina. Vinningurin kemur seinni, sigur Hallgerð Arge Hansen, sum er lærari og hevur gjørt kanningar av, hvussu skúlanæmingar eru fyri. Teir næmingarnir, sum ikki fóta sær í byrjunarundirvísingini, koma at rinda rokningina

Randi Jacobsen

Hallgerð Arge Hansen hevði ein granskara aftrat sær, tá ið hon í 2000 fór undir at gera eina kanning av, hvussu til stóð við lesiførleikanum í skúlum kring landið. Kanningin varð endurtikin í 2001 og 2002. Oda Johannesen hjálpti til við kanningini.

Tilvildarliga valdu tey tveir býarskúlar, tveir miðalstórar skúlar og sjey smáar bygdaskúlar við samanlagt 130 næmingum. Kanningin vísti, at stórur partur av næmingunum høvdu hjálp fyri neyðini, men fingu ikki neyðugu hjálpina eisini tí, at eingin hjálp var at fáa, tí aðrir truplir næmingar vóru farnir við øllum hesum tillutaðu tímum.

Hallgerð Arge Hansen heldur tað var syrgiligt, at skúlarnir kendu seg noyddar at spara tímar til teir næmingar, sum høvdu so stóra hjálp fyri neyðini.

Samanumtikið kláraðu teir smáu bygdaskúlarnir seg best í hesum kanningum hesi trý árini.

– Saman við øðrum lærarum fóru vit undir eina kompenseraða ella teldutillagaða undirvísing. Tað vil siga, at vit brúktu telduna sum hjálparamboð. Fyrst arbeiddu vit í 14 dagar og so frá jólum og til summarfríðina hvønn mánadag. Vit vóru nógv úti í náttúruni, og næmingarnir tóku myndir og søgdu frá upplivingunum, sum vit so skrivaðu niður, og tey so lósu sum lesibók. Tey kláraðu væl alt telduarbeiðið, og tað gav teimum eitt herðaklapp, og tey trivust væl saman.

Foreldrini vóru eisini púra bilsin um, hvussu nógv sjálvsvirðið hjá teimum var styrkt.

**» Heilt nógvir lesiveikir næmingar fáa ongantíð nakra hjálp. Teir veikastu næmingarnir sleppa at gjalda rokningina**

### Felagið Lesi/skriviveik

– Fyri trimum árum síðani tóku vit so henda táttin við kompenseraðari undirvísing ella tað, sum vit kalla teldutillagaða undirvísing uppaftur sum tilboð til foreldur og børn hjá limum í felagnum Lesi/skriviveik. Nú vóru so nógv telduforrit ment til hetta endamál, og vit høvdu fingið føroyska teldutalu og rættstavara og aðrar orðalistar, sum kundu leggjast inn í ymisk snild forrit, sum kundi lesa upp tað skrivaða bæði á føroyskum, donskum og enskum og øðrum málum við. Her eru øgiligir møguleikar hjá teimum, sum tíma at arbeiða við hesum hjálpartólum, tí man kann næstan fáa ta útbúgving man vil, sjálvt um tað bilar við at lesa og skriva. Men tað krevur upplæring, og tað er tað, vit royna at bjóða okkara limum. Bara í ár hava 38 næmingar gingið hjá okkum harav 10 vaksin, og 18 næmingar standa á bíðilista, sigur Hallgerð Arge Hansen.

### Lítil stuðul

Men tað sær út sum, at bara tveir av hesum 28 næm-